tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Signar fær sína kanning

Oddagrein

SAMBART útvarpinum fær Signar Hansen nú sína nógv umrøddu kanning. Hetta hendir eftir at 13 tingmenn hava heitt á tingformannin um at seta ein kanningarstjóra, sum fær til uppgávu at kanna leiklutin hjá Signar á Brúnni í sokallaða sjónvarpsmálinum. Tvs. um landsstýrismaðurin hevur hildið seg til galdandi lógir og reglur, tá hann flutti sjónvarpinum pengar, so tað ikki fór í gjaldssteðg.

EFTIR okkara tykki er tað rætt at lata landsstýrismannin fáa hesa kanning. Hetta var so eisini tað, sum lá í kortunum, tá hann gjørdi av at heita á løgmann um at taka seg aftur úr sessinum. Bæði løgmaður og hansara egni flokkur tóku tá undir við, at ein kanning skuldi gerast av málinum. Signar á Brúnni, sum alla tíðina hevur mett seg at hava hildið landsins lógir segði tá alment, at hann vildi fegin reinsast í hesum máli. Hann segði samtíðis, at kom ein óheftur kanningarleiðari til ta niðurstøðu, at hann hevur borið seg skeivt at, so vildi hann eisini taka tað til eftirtektar.

LANDSSTÝRISMAÐURIN hevur alla tíðina víst á, at hann hevur fingið holla ráðgeving í hesum máli frá serkønum í fleiri aðalstýrum. Hann hevur entá reist málið í landsstýrinum og kunnað allar landsstýrismenninar, harímillum løgmann um alt málið. At løgmaður, sum hevur eftirlit við sínum landsstýrismonnum og skal tryggja, at teir ikki fyritaka sær nakað ólógligt, á hesum kunnandi fundinum við Signar á Brúnni ikki hevur lagt seg beinleiðis út í málið og steðgað eini møguligari ólógligari avgerð, má eisini kunna tulkast tann vegin, sum at løgmaður hevur góðtikið gongdina og avgerðirnar. Tvs. at hann hevur mett tað, sum landsstýrismaðurin hevði gjørt og fór at gera, vera rætt. Tann, sum tegir, hann samtykkir verður tikið til. Hetta er í hvussu so er ein sera áhugaverdur spurningur, og verður hann uttan iva eisini ein partur av kanningini, sum ein komandi kanningarstjóri skal gera. At fólkafloksmenn hava sett sett seg upp ímóti umrøddu kanning kann út frá hesi sannroynd „vandamáli“ tykjast náttúrligt. Men hinvegin er tað eisini beint ímóti tí, sum løgmaður hevur „lovað“ Signar á Brúnni.

VÍSIR kanningin, at Signar á Brúnni hevur gjørt nakað skeivt, so má almenningurin krevja, at ein líknandi kanning verður gjørd av øllum hinum landsstýrismonnunum, sum hava havt yvirtrekk. Verður landsstýrismaðurin reinsaður, so er tað bara gott, tí eingin hevur gleði av, at tað gongst einum landsstýrismanni illa, sum hevur handlað í bestu meining. Tí fyri tann, sum hevur fylgt hesum máli, er lítil ivi um, at landsstýrismaðurin hevur handlað í bestu meining, og eingin ivi er heldur um, at hevði landsstýrismaðurin latið sjónvarpið farið í hundarnar, so hevðist eisini verið funnist at tí.

ÁHUGAVERT verður annars at frætta, hvussu nógvir tjóðveldistingmenn hava skrivað undir ynskið um eina kanning av sínum egna landsstýrismanni. Tað kann hugsast, at ikki allir tjóðveldistingmenn hava skrivað undir, og um so er , tá er tað eisini í tráð við tær gitingar, sum hava verið um eitt internt valdsstríð í Tjóðveldisflokkinum. Tað tykjast at vera kreftir í flokkinum, sum ynskja Signar á Brúnni, har piparið grør.

NÚ verður so bíðað eftir, at tingformaðurin skal útpeika ein kanningarstjóra. Vit kunnu so bert vóna, at málið fær ta viðgerð, sum tað hevur uppiborið. Og at allur ivi eigur at koma tí skuldsetta til góðar.

Sosialurin

Eiga at gera býarsavn

Mentanarálitið hjá Tórshavnar býráð mælir til, at serkøn fólk verða sett til at savna inn tilfar til býarsavn. Arbeiðið skal gerast í neyvum samstarvi við Fornminnissavnið

JOHN JOHANNESSEN

Somuleiðis sum nýggja mentanarálitið hjá Tórshavnar býráð mælir til, at serkøn fólk fáa latið upp í hendur at skriva søgu býarinnar, verður eisini mælt til at fyrireika býarsavn.

Mentanarálitið mælir til, at serkøn fólk verða sett at standa fyri innsavnan, skráseting og skipan av ymiskum fornlutum í Havn, soleiðis at býarsavn kann gerast. Hetta arbeiðið skal alt gerast í neyvum samstarvi við Føroya Fornminnissavn.

Arbeiðið við býarsavninum skal eisini innibera, at hús og býlingar við serstakum søguligum og byggisøguligum virði verða skrásettir í miðvísari ætlan og koma undir stuðuls- og verndarskipan. Eisini skal á hvørjum ári latast heiðursbræv fyri góða bygging og urtagarðsrøkt.

Í sambandi við, at Tórshavnar býráð hevur ætlanir um at geva søgu býarinnar út í bók, mælir mentanarálitið til, at serkøn fólk fáa til uppgávu at skriva Tórshavnar søgu frá landnámi til okkara dagar. Nýggjasta býarsøgan skal eisini vera við, og eigur hon at greiða frá teimum stóru broytingunum, ið farnar eru fram tey seinastu ættarliðini.

Mentanarálitið mælir harafturat til, at tilfarið við uppmátingum, tekningum og skjølum um gamla býin, ið býararkitekturin hevur gjørt saman við Fornminnissavninum verður savnað og givið út í bók.

Sum grundgeving fyri sínum sjónarmiðum vísir álitið á, at býarsøgan er sjálvt grundarlagið fyri at kunna skilja dagsins samfelag, dagsins mentan og tey fólk, sum nú liva og virka í býnum. Víst verður á, at Havnin er ein søguríkur býur við mongum sporum av lívi í meira enn túsund ár, men enn er eingin býarsøga skrivað.

Gjørt verður eisini greitt, at býarsøgan er ein partur av hesi felags søgu, Staðfest verður, at gamli býurin hevur skipan, sum kann verja og varðveita hann, men onnur hús og aðrir býlingar eru, sum hava stórt søguligt virði, men sum ikki eru undir somu vernd.

Politiskur fundur verður í Klaksvík leygardagin

Leygardagin klokkan 15 verður politiskur fundur í Klaksvík. Fundurin, sum valfeløgini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum skipa fyri, verður í Ósaskúlanum.

Evni á fundinum er politiska støðan í dag, og fundurin verður skipaður soleiðis, at hvør flokkur leggur fyri við einum evni, og orðaskifti verður ímillum hvørja framløgu.

Fólkaflokkurin fer at tosa um politisku støðuna á fiskivinnuøkinum. Sambandsflokkurin um ríkisfelagsskapin. Javnaðarflokkurin um støðuna innan almanna- og heilsuøki. Og Tjóðveldisflokkurin fer at tosa um búskapin.

Orðstýrari verður Christian Olsen.

Viðmerking:

Partapolitisk almenn tíðindastova?

Dagin fyri, at samráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina byrjaðu, sá ein nýggj føroysk tíðindastova dagsins ljós fyri fyrstu ferð. Á heiðursplássi á sjálvari heimasíðuni hjá Føroya Tele, sóðu allir føroyingar, sum fóru út á internetið henda dagin, ferskastu tíðindini frá samráðingunum í Keypmannahavn. Ja sjálvt tey, sum ikki vistu av hesi tænastu, rendu seg beint í hana, um tey høvdu onnur ørindi úti á internetinum.

Hetta var sera góð tænasta, har tú alla tíðina kundi fylgja við í gongdini undir samráðingunum í Keypmannahavn.

Virkaði ikki partapolitisk

Í fyrstani virkaði henda tíðindastova als ikki partapolitisk, hóast ein kundi undrast ivir, hví stovningardagurin rakti so beint á áðurnevndu stórhending.

Men sum fráleið, - tá samráðingarnar vóru lidnar - minkaði áhugin hjá tíðindastovuni at skriva tíðindi. Tó vaks hann nakað aftur tann 8. apríl, tá bókin hjá varðaløgmanni kom út í Danmark.

Síðani gingu tríggir dagar, áðrenn næsti tíðindastubbi kom, og tveir dagar seinni, komu aftur tveir tíðindastubbar. Og so var ein pausa í heilar fimm dagar, til vit fingu "stórtíðindini" um, at ein føroyingur hevði fingið riddarakross frá drotningini.

Tað sum undrar meg serliga nógv, og sum fær meg at gera hesa viðmerkingina er, at nýggjasta veljarakanningin hjá Fynd, sum var ein lemjandi ósigur fyri landsstýrið og samgonguna, fekk onga yvirskrift hjá tíðindastovuni.

Almenn ogn

Føroya Tele er almenn ogn, og tí má tað vera eitt krav, at hesin stovnur ikki verður nýttur til partapolitiska lýsingarherferð. Serliga ein so sjónlig heimasíða, sum er _startsíða“ hjá teimum flestu, eigur at vera óheft.

Nú verður spennandi at vit, um ferð aftur kemur á tíðindastovuna 2. mai, Tá landsstýrið aftur verður í Keypmannahavn.

Helgi Abrahamsen

Rætting

Í greinunum um havumhvørvi, oljuleiting ol. í gjár kom eitt eftirnavn skeivt fyri. Vit skrivaðu, at Súni Joensen er settur í starv á Umhvørvisdeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Maðurin eitur Súni Petersen. Vit biðja um umbering.

Blaðstj.

Fá arbeiðsroyndir til at søkja inn á reklamuskúla ella grafiskan designskúla

Kundi tú hugsað tær at slept tínum sonsum leysum og farið á grafiskan designskúla ella reklamuskúla, so bjóðar reklamuhúsið Sansir tær arbeiðsroyndir, áðrenn tú søkir.
Reklamuskúlin setur krav um, at tú hevur 2 - 3 ára arbeiðsroyndir ella útbúgving frá Den Grafiske Højskole ella líknandi. Den Grafiske Højskole og Danmarks Designskole krevja ikki arbeiðsroyndir, men mæla til, at tú fært tær royndir, áðrenn tú søkir.
Vilt tú hava upplæring hjá Sonsum, er tað ein fyrimunur, um tú hevur studentsprógv, HF, HH ella líknandi alment búgvandi royndir.
Góður form- og litsansur og eitt gott hugflog er avgjørt eitt krav. Ert tú ein góður fríhondsteknari, er tað enn betri. Og hevur tú tað gott við tónleiki, ger tað ikki støðuna verri.
Eitt lætt lyndi, góð samstarvsevni og royndir at arbeiða í bólki eru eisini góð at hava í viðførinum.
Send eina stutta frágreiðing um teg sjálva/n saman við tekningum og/ella øðrum grafiskum tilfari, tú hevur tilevnað.
Kunnu vit ikki taka dagar ímillum innsenda tilfarið, fara vit at geva tykkum eina grafiska uppgávu at loysa, sum vit síðani taka støðu útfrá.

Tú skalt byrja 7. august 2000. Seinasta freist at søkja er mánadagin 15. mai 2000.

SANSIR

Sansir pf, Tinghúsvegur 47, Box 1099, FO-110 Tórshavn, Tel 355 355, Fax 355 350, sansir@sansir.fo

www.sansir.fo